# ítróttur

Nr. 230 • mikudagur • 28. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystaryvirlit

**1. deild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 27.11 | 18.00 | Kyndil-Sóljan | Poli/Jústines |
| 28.11 | 18.30 | StÍF-VÍF | Kári/Trúgvi |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 28.11 | 20.00 | StÍF-VÍF | Kári/Trúgvi |
| 28.11 | 20.00 | Tjaldur-Neistin | Hannis/Uni |
| 28.11 | 20.00 | Kyndil-H71 | Hjalmar/Kristian |

# Spennandi hjá oddinum

**Bæði VÍF og Neistin hava torførar útidystir á skránni mikukvøldið**

HONDÓILTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Sum kappingin hevur lagað seg, so tykjast tað verða VÍF og Neistin, sum skulu dystast um gullmerkini í bestu mansdeildini, og bæði hesi skulu í eldin mikukvøldið.

### Torføriri dystir

Fyri báðar partar er talan um dystir, sum kunnu verða sera torførir, so tó at bæði liðini mugu roknast fyri favorittar, so man eingin teirra taka nakað fyri givið.

Vestmenningar fara á vitjan á Skála, og har hava teir so longu fingið í minsta lagi eina ávaring, tá StÍF herfyri tók stig frá Neistanum. Harafturat var StÍF einasta liðið, sum megnaði at koppa vestmenningum í fjør, og ivaleyst vilja meistararnir eisini hevna hetta.

StÍF hevur í ár givið prógv um, at liðið kann spæla fult upp ímóti oddaliðunum, men hinvegin hava avrikini hjá liðnum verið ov óstøðug til, at liðið veruliga kann gera seg galdandi. Spurningurin er so, hvar avrikið hjá teimum fer at liggja á víttfevnandi skala teirra hesaferð.

Neistin fer samstundis á vitjan hjá Tjaldri, og fyri bara einum ári síðani, hevði hetta neyvan verið nakar dystur, sum Neistin hevði roknað við nøkrum trupulleikum av.

Eftir fleiri ár við løkum úrslitum, er rákið tó vent í Runavík, og í skrivandi løtu hevur liðið ikki tapt í trimum dystum á rað. Teirra millum á útivølli móti StÍF.

Í fyrra dystinum millum liðini í grundspælinum vann Neistin akkurát við einum brotskasti í seinasta sekundinum av dystinum. Í Havn vilja teir sjálvndi vera við, at liðið er vorðið betri síðani tann dystin, men spurningurin er so, uim Tjaldur ikki hevur betrað seg eins nógv.



*Tjaldur skal mikukvøldið royna at halda fast um góðu gongdina, sum nú hevur ført teir ósigraðar ígjøgnum tríggjar dystir á rað*

### Lokauppgerð á Hálsi

Seinasti dysturin mikukvøldið verður í Havn, har Kyndil tekur ímóti H71.

Enn einaferð má Kyundil finna seg í leiklutinum sum outsidari í dystinum, og hetta tykist gerast vanligi leiklutur teirra í ár.

Hoyvíkingar hava hinvegin triðja plássið í deildini at spæla um. Um vikuskiftið skryktu teir seg leysar av strandingum í hesum stríðnum, og møguleiki er nú at økja um munin, um so er, at VÍF fer at fáa fulla úrtøku á Strondumk.

# Flytingar í botninum

*Kyndil og Sóljan skuldu týskvøldið stríðast um, hvør teirra skuldi skapa eitt sindur av fjarstøðu til botnsessirnar*



**Onkrar broytingar verða í botninum á stigatalvuni eftir dystirnar í miðvikuni**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Av misgávum umrøddu vit ikki komandi dystin millum Kyndil og Sóljuni í týsdagsútgávu okkara. Hestin dysturin skuldi leikast á Hálsi týskvøldið eftir evstamark okkara.

Her verður tað setningurin hjá báðum pørtunum at vinna sær tvey harðliga tiltrongd stig, soleiðis at eitt sindur av frástøðu kann fáast til niðastu sessirnar. Fyrra dystin millum liðini vann Kyndil við einum máli, og so er spurningurin, hvørt tær megna eina endurtøku av hesum.

### Torført hjá StÍF

Á Skála kemur VÍF á vitjan hjá StÍF, og her er einki at ivast í, at VÍF er risastórur favorittur. Tað hevur verið mest sum leikandi lætt hjá verjandi meistarunum higartil í ár, og einki er, sum bendir á, at StÍF megnar at steðga sigursrøðini.


Lýsið við brúktum bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo

NOA® NOA

Handilin er á tremur
við nýggjum frá NOA-NOA

Hesa vikuna hava vit eitt
serligt føðingardagstilboð:

Sett í sweat-shirt toy

Jakki v/hettu, svartur, str. S-XL
vanl. prísur 599,-

buksur v/elastik um miðjuna, svartar,
str. S-XL, vanl. prísur 599,-

Tilboðsprísur 798,-
Sett: jakki + buksur

29
Í Tróndargøtu
tel. 318200
fart. 218199





Langur Leygardagur í Runavík

Komandi vikuskifti er langur leygardagur og
marknaðardagur í Runavík.
Í hesum sambandi bjóðar Sjómansheimið
tilboð uppá gisting

Frá fríggjadag til sunnudag:
Fyri hvønn á dupultkamari: 475,-

Hetta er galdandi hvørt vikuskiftið fram til jóla.

Kalt borð

Hvørt leygarkvøld og sunnukvøld
hava vit kalt borð
**frá kl. 17.00-20.30**

*Vælkomin á Runavíkar Sjómansheim.*

Tlf. 447420 · fax 448830 · e-mail: hotell@post.olivant.fo



Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo



Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk
Sosialurin


## Frá SøluRásini 2001

Vit vilja her takka øllum framsýnarum og tykkum, sum undirhildu. Stóra tøkk øll tit, ið viljaðu stevnuna og sum hjálptu til bæði við einum og øðrum. Vit vilja ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár. SøluRásin 2002 verður aftur vikuskiftið 2. og 3. november 2002.

**Vinarlig heilsan**

**Skála Ítróttarfelag, Skála Róðrarfelag, StÍF og Strálan**

